# ÍF styrkti sína støðu

*2. deild: Fuglfirðingar hava framvegis møguleikan at vinna sær rætt til fyrstudeildarfótbólt komandi ár, og leygardagin vunnu teir týdningarmiklan sigur á*



*Runavíkingar tykjast nú at hava mist takið í næstbestu deildini, men nakar vandi fyri niðurflyting fer neyvan at koma upp á tal*

NSÍ–ÍF 0–3 (0–1)

Tá fuglfirðingar klokkan 16 seinnapartin leygardagin fóru á vøllin í Runavík, vistu teir, at um teir megnaðu at fáa øll stigini við til hús, so fóru teir at styrkja um sína støðu í uppflytingarstríðnum. Javnleikurin hjá TB í Leirvík var greiður undan dystarbyrjan í Runavík.

Fuglfirðingar høvdu bóltin meiri í fyrra umfarinum, men teir høvdu ikki nógvar upplagdar møguleikar. Teir komu á odda, tá hálvur tími var farin. Liðformaðurin Torstein Joensen, sum í 1. hálvleiki var á miðvøllinum, vann fríspark mitt á NSÍ hálvuni í høgru, ein annar miðvallari, Eyðálvur R. Petersen sendi í brotsteigin, har miðverjin, Viggo Johannesen, fekk loyvi at stýra bóltinum í málið.

Beint aftaná hevði NSÍ fríspark í høgru, men Erling Joensen, sum heldur frí frá langfarasiglingini og hevur vart ÍF málið síðani summarsteðgin, refleksbjargaði stútaranum frá Dann Knudsen við handara stólpan.

Fyrstu tíggju minuttirnar av 2. hálvleiki trýsti NSÍ fyri at javna. ÍF setti tveir ungar menn, Eyðun Ryggshamar og Høgna Zachariassen, inn á miðvøllin, og Torstein Joensen fór aftur á vongverjan í høgru. Tað hjálpti hjá ÍF, men í álopinum frammanundan, at ÍF økti, var NSÍ tætt við at javna. Álop, sum byrjaði í vinstru hjá U–18 landsliðsspælaranum, Áka L. Hansen, endaði í vinstra borði, har Johnny Skibenæs lyfti innfyri. Bólturin fór omanfyri Erling Joensen, rakti í handara stólpan, og ein verjuspælari var fyrstur á, tá bólturin kom út frá aftur.

Í næsta álopinum økti ÍF. Høgni Zachariassen lyfti fram ímillum, Ólavur Højgaard í NSÍ málinum kendi seg noyddan at leypa út, men miðframherjin hjá ÍF, Høgni á Lakjuni, var fyrstur á. ÍF spælarin, sum undan summarsteðginum var á 2. deildarliðnum hjá NSÍ, lyfti upp um málverjan, og bólturin stiklaði akkurát inn um strikuna, áðrenn verjuspælarin náddi at sparka burtur.

Tá vóru 55 minuttir farnir, og so hevði ÍF fleiri møguleikar. Eitt nú kom Hergeir Eldevig, sum var sera raskur í høgru, púra leysur, men hann sendi omanfyri málið. Vongverjin í vinstru, Mortan Thomsen, staðfesti sigurin eitt stórt korter undan leikloki. Hann var púra leysur á brotssparksplettinum og hevði góðar stundir at stúta innleggið úr høgru upp um málverjan og inn í síðunetið.

NSÍ var skert av leikbannum í 1. deild. Bergur Djurhuus var eyðsýndur á miðvøllinum, men í 2. hálvleiki var tað týðuligt, at fleiri av viðspælarunum ikki vóru í nóg góðari venjingarstøðu.

**jh**

NSÍ–ÍF 0–3 (0–1)
0–1: Viggo Johannesen 30.
0–2: Høgni á Lakjuni 55.
0–3: Mortan Thomsen 73.

# Pól bíðar eftir uppflytingini

***1. deild í Íslandi**: Uppflytingarveitlsan hjá Váli er útsett í eina viku, men lítil ivi tykist vera um, at uppflytingin gerst veruleiki komandi vikuskifti*

Ein av mest trúføstu stuðlunum hjá Allani Simonsen hevur tey seinnu árini verið Pól Thorsteinsson. Í ár hevur einki verið at hoyrt til hansara í landsliðshøpi. Eftir samanbrestin við Patrick Berger og reyða kortið í Prag í oktober í fjør setti UEFA Pól í skammikrók. Fyrsta partin av banninum bar Pól, tá Slovenia var á Svangaskarði. Tveir partar eru eftir. Tá ferðin til Sveis og Jugoslavia verður av um ein mánað, verður Pól Thorsteinsson aftur tøkur á landsliðnum. Eftir dystin ímóti Danmark ásannaði Allan Simonsen, at hann bíðar eftir at fáa Pól aftur á landsliðið.

Bíðitíðina eftir altjóða fótbólti hevur Pól Thorsteinsson brúkt væl og virðiliga í Íslandi. Hann spælir við Váli, sum í fjør fyri fyrstu ferð nakrantíð flutti niður í næstbestu deildina, og sum í ár hevur stríðst fyri at vinna sessin í bestu deildini aftur.

FH av Hafnafirði er ovast í næstbestu deildini. Válur skal spæla ímóti teimum komandi vikuskifti, men tað er longu frammanundan greitt, at FH vinnur næstbestu deildina og flytir upp.

Válur kundi havt tryggjað sær uppflyting fríggjakvøldið. Tá spældu teir ímóti KA av Akureyri. Eftir fyrra umfarið sá alt ljóst út hjá Póli og teimum. Válur var frammanfyri 2–0, men í 2. hálvleiki kiksaði alt hjá teimum. KA skoraði trý mál, og harvið varð uppflytingarveitslan hjá Váli útsett. KA kann røkka sama stigatalið sum Válur, men reykjavíkarfelagið hevur so mikið nógv betri málmun, at í veruleikanum ber tað ikki til hjá KA at røkka Váli.

Orsøkin til at tað hilnaðist so illa hjá Váli var, at teir eftir tíggju minuttir í 2. hálvleiki mistu ein mann. Málverjin var eitt sindur ótryggur, og so gekk skjótt skeiva vegin.

Pól Thorsteinsson hevur ikki gjørt sær fyri skommum í Váli. Hann hevur sum tann einasti spælt allar dystirnar á tamb, og hann hevur bara fingið eitt gult kort.

Um eina viku verður Pól fyri hesa ferð leysur av íslendskum fótbólti.

**jh**

# TB meiri enn hálvsnávaði

*2. deild: TB noyðist nú at ásanna, at tað neyvan verður talan um nakra beinleiðis uppflytan í ár*

LÍF-TB 1-1 (0-0)

Tvørámenn kundu bæði vera nøgdir og ikki nøgdir, tá teir seinnapartin leygardagin fóru úr Leirvík. Tá teir komu norður, høvdu teir ætlað sær øll stigini fyri harvið at varðveita greiða anað plássið í deildini. Undir dystinum vóru teir fyri tað mesta kroystir aftur á egna hálvu, og harvið áttu teir kanska at verið nøgdir við málleysan javnleik.

Tá tað restaðu tíggju minuttir fingu teir eitt mál so at siga burtur úr ongum, og so lá tað til, at teir skuldu fáa øll stigini. Støðan helt sær bara tríggjar minuttir. So helt dómarin – hann hevði ikki serliga breiða undirtøku fyri sínum sjónarmiði á og kring vøllin – at beinini vórðu krøkt undan Jonhardi Høgnesen, tá hann mitt fyri málinum var komin inn í brotsteigin. Tomek Resel javnaði við brotssparkinum, og so komu ikki fleiri mál.

At LÍF ikki megnaði at fáa fulla úrtøku setti ljóskastaran enn eina ferð á stóra trupulleikan, sum teir í ár hava havt við at umseta møguleikarnar til mál. Heimaliðið hevði bóltin nógv meiri, og teir vóru serliga vandamiklir seinnapartin av 2. hálvleiki. Mitt í 2. hálvleiki kom Kristian í Vági á vøllin, og tá kom nógv meiri tyngd í álopspartin hjá LÍF. Kristian hevur ikki spælt síðani summarsteðgin, tí hann hevur verið í Danmark í skúla.

Petur Sjúrðarberg var í álopinum frá fyrsta bríksli. Mitt í 1. hálvleiki fekk hann ein løst í beinið. Hann var á vøllinum inntil mitt í 2. hálvleiki, men tað var týðuligt, at hann var darvaður av skaðanum. Tá Kristian í Vági loysti hann av, hevði LÍF fleiri møguleikar. Teir báðir størstu vóru eftir uppspæl í vinstru og innlegg í brotsteigin.

Í fyrra førinum varð skotið hjá Jonhardi Høgnesen úr málteigarhorninum í høgru blokerað út til horna. Hin møguleikin var uppaftur størri. Kristian í Vági var bara átta metrar úr málinum og mitt fyri, tá hann valdi at temja flatt innlegg. Men ólukkutíð fyri leirvíkingar fekk ein verjuspælari akkurát tonna á, so bólturin fór omanfyri málið hjá Magna Hentze.

Signar Skaalum, sum er hvalbingur og búsitiandi á Tvøroyri – hann hevur áður spælt við Royn – skoraði TB málið. Verjukendi miðvallarin sendi úr átjan metrum flatt framvið Trygva Olsen, eftir at TB hevði havt innkast í vinstru.

Tað var týðuligt, at TB restaði fleiri av føstu monnunum. Eyðun Gullok Svalbard og Birgir Jørgensen vóru báðir leikbannaðir, og harvið var tyngdin í álopinum burtur. At fyrsti álopsmaðurin, Dan Mortensen, breyt beinið beint undan summarsteðginum, og at verjuspælarin Magni Petersen hevur trupulleikar við ælboganum ger ikki støðuna betri hjá TB, sum skal stríðast fyri at varðveita næstfremsta plássið.

Leirvíkingar tykjast sleppa undan beinleiðis niðurflyting, men um teir skulu fáa nógv stig afturat, so skulu teir fáa mál viðhvørt, tá teir spæla seg til møguleikar.

**jh**

LÍF–TB 1–1 (0–0)
0–1: Signar Skaalum 80.
1–1: Tomek Resel 83.

## Úrslit, danska superligan

| | |
|---|---|
| 10.09.00 AB-Herfølge | 1-3 |
| 10.09.00 Viborg-FC Midtjylland | 0-0 |
| 10.09.00 Haderslev-OB | 1-4 |
| 10.09.00 Lyngby-Brøndby | 1-3 |
| 10.09.00 Silkeborg-AGF | 2-1 |
| 11.09.00 AaB-FCK | |
| Leiktur eftir evstamark | |

**Komandi dystir**

17.09.00 Aab-AGF
17.09.00 Haderslev-Lyngby
17.09.00 Herfølge-FC Midtjylland
17.09.00 FCK-OB
17.09.00 Viborg-Silkeborg
18.09.00 AB-Brøndby

**Úrslit, íslendska landssímadeildin**

| | |
|---|---|
| 10.09.00 Grindavík-Fylkir | 2-1 |
| 10.09.00 ÍA-Keflavík | 2-2 |
| 10.09.00 Breiðablik-Stjarnan | 3-3 |
| 10.09.00 Leiftur-Fram | 2-1 |
| 10.09.00 KR-ÍBV | 1-0 |

**Komandi dystir**

16.09.00 ÍBV-Grindavík
16.09.00 Fylkir-ÍA
16.09.00 Keflavík-Leiftur
16.09.00 Stjarnan-KR
16.09.00 Fram-Breiðablik

**Úrslit, norska 1. deild**

| | |
|---|---|
| 10.09.00 Ham-Kam-Kongsvinger | 4-2 |
| 10.09.00 Kjelsås-Eik-Tønsberg | 0-0 |
| 10.09.00 L/F Hønefoss-Skeid | 4-1 |
| 10.09.00 Raufoss-Tromsdalen | 3-1 |
| 10.09.00 Sogndal-Sandefjord | 6-0 |
| 10.09.00 Strindheim-Lyn | 3-3 |
| 10.09.00 Strømsgodset-Byåsen | 10-2 |

**Komandi dystir**

17.09.00 Byåsen-Ham-Kam
17.09.00 Eik-Tønsberg-L/F Hønefoss
17.09.00 Kongsvinger-Raufoss
17.09.00 Sandefjord-Strømsgodset
17.09.00 Skeid-Lyn
17.09.00 Sogndal-Strindheim
17.09.00 Tromsdalen-Kjelsås



# Gli› er komi› á hjá Herfølge

*Óli Johannesen var fyri fyrstu fer› í næstan eitt ár ímillum teir fyrstu ellivu hjá AGF, sum gjørdist undirmanna› og tapti*

Herfølge hevur fóta› sær, og nú eru teir so spakuliga á veg burtur frá ni›urflytingarplássunum. Sunnudagin vóru teir í Gladsaxe, og har vunnu teir 3–1 ímóti AB, sum ikki hevur vunni›, sí›ani teir gjørdu av vi› B36 í UEFA Cup. AB, sum hesa fer› spældi uttan landsli›smenninar Brian Steen Nielsen og Michael Johansen, hevur tapt f‡ra landskappingardystir upp í slag.

Lars Jacobsen setti hol á fyri Herfølge eftir málverjukiks í 7. minutti. Abdul Sule slapp at standa órógva›ur í Herfølge málteiginum, tá eitt korter var fari›, og so var javnleikur. Stutt undan ste›ginum skora›i Jesper Falck fyri Herfølge, og eitt korter undan leikloki var sami spælari aftur upp á spæl.

Jákup Mikkelsen vardi máli› hjá Herfølge. Hann hev›i fleiri gó›ar bjargingar, umframt at hann var tryggur, tá vi›spælararnir spældu aftur til hansara.

Herfølge skal hósdagin spæla á útivølli í UEFA Cup. Dysturin ver›ur ímóti svenska AIK Stokholm, sum hevur heimavøll á Råsunda, har Svøríki spælir heimadystirnar, um teir ikki ver›a spældir á Nya Ullevi í Göteborg.

– Eftir meistaraskapin og undanumfari› til Europa Cup fyri meistarar eru vit so rudduliga komnir ni›ur á jør›ina, og nú vísa vit ta› spæli›, sum í fjør bar meistaraskapin vi› sær, seg›i John Faxe Jensen eftir sigurin sunnudagin. Hesa fer› var venjarin sjálvur á li›num.

AB skal eisini spæla í UEFA Cup hósdagin. Teir skulu spæla í Prag ímóti Slavia.

### Óli á mi›vøllinum

Tá Óli Johannesen fyri einum gó›um ári sí›ani var› seldur til AGF, kom hann mest sum beinanvegin á besta li›i›. Sí›ani sí›sta heyst hevur hann ongantí› veri› ímillum teir fyrstu ellivu, men ta› var hann sunnudagin. Merkisvert var ta›, at Óli Johannesen hesa fer› var á verjukenda mi›vallarplássinum. Har hevur hann ikki veri› í AGF, men heima í TB er Óli ikki ókendur vi› ta› plássi›.

AGF kom í Silkeborg á odda í 17. minutti. Langskotsmáli› hjá Bo Nielsen var framúr gott. Í 34. minutti versna›u fyritreytirnar hjá AGF heilt nógv. Tá fekk verjuspælarin Ken Martin rey›a korti› fyri ney›bremsu. Hetta var annar dysturin á ra›, at ein av verjumonnunum hjá AGF fekk rey›a korti› fyri ney›bremsu. Mikukvøldi›, tá Lyngby vann 4–1 í Århus, var› Dennis Sim rikin av vøllinum.

Hóast teir vóru undirmanna›ir, so megna›i AGF at halda tørn inntil í 72. minutti. Tá javna›i Henrik Pedersen, sum var fyrstu fer› á landsli›num, tá danska landsli›i› var í Føroyum. Sigursmáli› stúta›i Thomas Røll, tá ta› bara resta›u fimm minuttir.

### Todi klárur

OB var í Haderslev. Heldur ikki hesa fer› eydna›ist ta› n‡ggja li›num í superliguni at fáa stig. Føroyski landsli›sma›urin, Johan B. Hansen, var ikki ímillum teir fyrstu ellivu hjá OB, og hann var› ikki skiftur inn.

OB vann 4–1, og ta› var merkisvert, at tr‡ mál vór›u skora› upp á brotsspark. Michael Hemmingsen skora›i upp á brotsspørk í 17. og 32. minutti, og í 34. minutti minka›i Haderslev um munin vi› brotssparki.

Oddali›i› Lyngby, sum í 73 minuttir spældi vi› tíggju monnum, tapti ímóti Brøndby. Minuttin eftir útvísingina skora›i Lyngby, og teir megna›u at halda tætt, inntil ta› resta›i eitt korter. So skora›i VBrøndby tríggjar fer›ir. Ta› hevur vi› sær, at ta› er rættuliga tætt. Í gjárkvøldi› klokkan 18 skuldi FCK spæla á útivølli í Aalborg. Í vikuskiftinum var greitt, at Todi Jónsson skuldi vi› FCK til Jyllands. Todi var ikki vi›, tá FCK mikukvøldi› vann 1–0 í Parkini ímóti AB. Men nú tykist ta›, sum um ska›in, i› Todi næstsí›sta fríggjakvøld fekk í læri› á Svangaskar›i, er burtur.
Í Viborg var ta› líti› áhugavert, tá heimali›i› og FC Midtjylland spældu 0–0.

JH

# Leiftur vann og dumpa›i

*Ta› ver›ur mett sannlíkt, at Páll Gu›laugsson aftur komandi ár ver›ur venjari á Ólafsfir›i*

Fyri fyrstu fer› í fleiri vikur fór Uni Arge sunnudagin av vøllinum uttan at teljast millum málskjúttarnar. Teir á Akranesi høvdu vitjan av Keflavík, og ta› var um reppi›, at gestirnir fóru avsta› vi› øllum stigunum. Keflavík kom á odda 2–1, tá ein hálvur tími var eftir, og f‡ra minuttir seinni høvdu teir møguleikan at økja um lei›sluna, men teir misn‡ttu brotsspark.

ÍA javna›i í evstu løtu. Baldur A›alsteinsson sendi úr brotsteiginum bóltin aftur um seg sjálvan og í máli›. So var stø›an 2–2, og ta› gjørdist endaliga úrsliti›, tí dómarin bríksla›i dystin av, á›renn spæli› var› sett í gongd aftur.

Ta› var strevi› hjá ÍA, tí teir vóru aftanfyri ta› mesta av tí›ini. Í 26. minutti setti Keflavík hol á, og í 58. minutti javna›i ÍA. Ta› var Alexander Högnason, sum umsetti brotsspark til mál.

ÍA hevur mist møguleikan at vinna meistaraskapin. Nú hugsa teir mest um steypafinaluna, sum ver›ur ímóti ÍBV sunnudagin 24. september.

### Leiftur li›ugt

Jens Martin Knudsen var ikki á li›num hjá Leiftri, og avloysarin var ikki serliga heppin. Longu í 5. minutti gjørdi hann eitt mistak, sum hev›i vi› sær, at Fram kom framum. Lei›slan helt sær til í 53. minutti. Tá javna›i brasiliuma›urin Alexandro Santos. Leiftur fekk sigursmáli› eitt korter undan dystarloki. Hör›ur Már Magnússon sendi umvegis tvørtræi› í máli›.

Hóast føroyingarnir á Ólafsfir›i vunnu, so er ta› greitt, at Leiftur, sum í fjør vann bronsukrónur, skal spæla í næstbestu deildini komandi ár. Teir enda á aftasta plássinum.

Undan vikuskiftinum ljó›a›i í íslendskum fjølmi›lum, at ta› er upp á tal, at Páll Gu›laugsson aftur komandi ár skal vera venjari hjá Leiftri. Páll, sum vandi Keflavík fyrr í summar, og sum hesar seinastu vikurnar hevur veri› á beinkinum hjá Leiftri, hev›i ábyrgdina á Ólafsfir›i í fjør og í fyrraári›. Tá stó› Leiftur seg betur, enn teir nakrantí› á›ur hava gjørt.

Tr‡ li› strí›ast fyri at sleppa undan næstaftasta plássinum. Fram er illa fyri, men teir hava sjálvir møguleika at senda Brei›ablik ni›ur. Tri›ja li›i› er Stjarnan.

### KR best fyri

Besta bo›i› uppá meistaraskapin er KR, sum eisini var meistari í fjør, tá teir eisini vunnu steypakappingina. Sunnudagin gjørdust teir n‡tt oddali›. Teir vunnu 1–0 á heimavølli ímóti ÍBV. Máli› fingu teir, tá eitt korter var eftir. Oddali›i› higartil, Fylkir, tapti 2–1 í Grindavík.

KR er tvey stig frammanfyri Fylkir. Um Fylkir vinnur í sí›sta umfarinum, tá teir skulu spæla ímóti Una Arge og ÍA, so ver›ur ta› ney›ugt hjá KR at vinna sín dyst fyri at gerast meistari. Fylkir hevur betri málmun enn KR, sum skal spæla ímóti Stjarnuni.

JH

# Flo hóttir Kurt Mørkøre

*Noreg: Sogndal vann aftur stórsigur og helt harvi› tørn um møguleikan at spæla um uppflyting*

Sogndal er framvegis vi› í kappingini at flyta upp í bestu norsku deildina komandi ár. Teir vunnu sunnudagin 6–0 á heimavølli ímóti Sandefjord. Kurt Mørkøre skora›i eitt mál. Hann hevur higartil veri› toppskjútti í næstbestu norsku deildini, men ta› er hann ikki longur. Jostein Flo spælir vi› Strømgodset, sum er næstfremst. Teir vunnu sunnudagin 10–2 ímóti Byåsen. Jostein Flo skora›i f‡ra mál. Nú er hann toppskjútti í 1. deild. Hann hevur skora› 20 mál, me›an Kurt Mørkøre hevur skora› nítjan mál.

864 ásko›arar hunga›u sær í sól og eitt sindur av vindi kring heimavøllin hjá Sogndal, Fosshaugana, men ta› tók sína tí›, á›renn sigurin var í pottinum.

Sogndal var omaná mesta partin av tí›ini, og longu í 9. minutti leg›i álopsfelagin hjá Kurt Mørkøre, Tommy Øren, Sogndal framum úr sjey metrum. Kurt Mørkøre hev›i næstsí›sta fótin á.

Sandefjord hev›i ein møguleika at javna í 1. hálvleiki, men teir sendu í stólpan, og tí›liga í 2. hálvleiki noyddist Sogndal málverjin, Terje Skjeldestad, at vísa stórspæl.

Tá ta› resta›i eitt korter glapp, og so gekk skjótt hjá Sogndal undan vindinum. Alexander Ødegaard skora›i úr 18 metrum, og ein minutt seinni var Kurt Mørkøre tryggur, tá hann var einsamallur vi› málverjanum.

Hans Fró›i Hansen og Julian Johnsson vóru vi› alla tí›ina. Kurt Mørkøre, sum hev›i fingi› gula korti›, var› skiftur út. Kristian Ystaas kom inn fyri Kurt, og hann skora›i tvey mál. Hitt fyrra tá 80 minuttir vóru farnir og hitt seinna, tá tríggir minuttir vóru eftir.

Komandi sunnudag fær Sogndal vitjan av Strindheim, sum er næstni›ast. Sunnudagin var ta› merkisvert, at Strindheim á heimavølli megna›i 3–3 ímóti oddali›num Lyn. Sandefjord skal spæla á heimavølli ímóti næstfremsta Strømgodset.

Kappingarári› í næstbestu norsku deildini ver›ur li›ugt 22. oktober, tá 26. og seinasta umfari› ver›ur á skránni.

JH